# Fyrstu video-klippini á portalinum

**Sunnukvøldið og mánamorgunin vóru video-brot at síggja á alnetinum. Talan er fyrstu livandi ítróttarmyndirnar, sum Miðfelagið hevur framleitt til alnetið**

ÍTRÓTTUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Fyri trimum vikum síðani gjørdu Miðlafelagið og ÍSF avtalu, sum gav Miðlafelagnum loyvi at senda livandi ljóð og myndir frá føroyskum ítrótti.

Fyrsta úrslitið av hesi avtaluni sæst nú portalinum. Á høvuðssíðuni ber til at velja ”kykmynd”, og síðani opna hesar eitt nýtt vindeyga, har klippini verða sýnd.

Talan er um royndaravtalu, og at byrja við er framleiðsluorkan avmarkað, og verður talan tí ikki um klipp frá eitt nú øllum dystunum í Formula-deildini. Hinvegin verður miðað eftir at hava ein breiðan dekning av føroyskum ítróttartilfari. Eitt nú er talan hetta vikuskifti um myndir frá tveimum dystum í Formula-deildini, umframt at kappróður og –renning frá jóansøkuni eisini verður at síggja.

Best er, um teldan, sum tu situr við, hevur breiðband, ta hyggjast skal at klippunum. Neyðugt er eisini at hava Windows Media Player.



*Alvin Ellebye Andersen er her í ferð við at klippa fyrstu innsløgini, sum nú síggjast á portalinum*

B36-ÍF 4-1 (3-1):

# B36 fekk hol á málskjótingina

**Bara næsti heimasigurin hjá B36 í ár kom til høldar, tá teir sunnudagin sýndu munin á ovaru og niðaru hálvu á stigatalvuni**

FÓTBÓLTUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

At HM-fótbóltur er á skránni sást millum annað á áskoðaratalinum í Gundadali sunnudagin. B36-skýlið var valla meira enn hálvfult, og fáu tandrini, sum stuðlaðu vitjandi liðnum rúgvaðu ikki stórvegis í stóra skýlinum vestaru megin vøllin í Gundadali.

## Heppin og vøkur mál

Sum so mundu tey, sum høvdu valt Ongland og Ecuador framum, heldur ikki missa tað heilt stóra. Snøgt sagt, so var munurin millum liðini fyri tað nógva ov stórur, til at veruligur spenningur kom í.

B36 var frá byrjan betra liðið, men tað skuldi nakað av hepni til, áðrenn teir fingu lagt seg á odda. Tað sá ikki serliga vandamikið út, tá Sylla legði bóltin flatt fram móti málinum, men onkursvegna droppaði Andras Gango fullkomuliga, og so smoygdi bólturin sær spakuliga í málið.

Var fyrsta málið heppið, var talan hinvegin um sanna perlu, tá Bergur Midjord økti til 2-0. Skjótt B36 uppspæl endaði við, at Kenneth Jacobsen spældi djúpt til Berg, sum var ísakaldur, tá hann lyfti upp um málverjan.

Tað eydnaðist fuglfirðingum at skapa nakað av spenningi, tá Høgni Zachariassen stútaði væl tikið fríspark í kassan, men tað lá tó alla tíðina í luftini, at heimaliðið skuldi enda omaná.

Tað gjørdi eisini spælið hjá B36 nakað róligari, at Obi stutt undan steðginum økti til 3-1 eftir sera gott forarbeiði av Hanusi Thorleifsson.

Eftir steðgin tóktist B36 í mest møguligan mun at hugsa um at koyra sigurin heim. Komandi umfarið verður talan um týdningarmikla grannuppgerð móti HB, og eitt nú vóru Mikkjal Thomassen og Kenneth Jacobsen í vanda fyri leikbanni, um teir fingu gult kort.

Fuglfirðingar kundu kanska bitið nakað frá sær, um hepnið var við teimum, tá teir høvdu einar tveirtríggjar møguleikar, men Jákup Mikkelsen stóð stinnur, tær fáu ferðirnar, vandi var á ferð.

Og móti dystarenda gjørdist sigurin ein staðfesting, tá Hanus Thorleifsson gjørdi sær dælt av sløsutum verjuspæli frá Fritleif í Lambanum.

## Tunnir fuglfirðingar

Sum heild má sigast, at dysturin staðfesti tann munin, sum er millum ovaru og niðaru hálvu av stigatalvuni. Hjá fuglfirðingum kom tað annars illa við, at teir máttu vera fleiri av vanliga føstu spælarunum fyriuttan, tá hesir vóru antin leikbannaðir ella skaddir.

Júst hetta er kanska ein av fremstu orsøkunum til verandi støðu hjá ÍF, og um ikki annað, so munnu teir fegnast um, at eitt nú Bartal Eliasen er tøkur komandi umfarið. Tá hevur ÍF týdningarmiklan heimadyst móti VB/Sumba á skránni, og meira enn nakað man hetta vera møguleikin, har ÍF skal skræða seg úr botninum.



*Fagnaðurin hjá hvíta havnarliðnum var stórur, tá teir loksins fingu hol á málskjótingina. 4-1 gjørdist úrslitið í sannførandi heimasigrinum móti ÍF*

*savnsmynd*


SØKT VERÐUR EFTIR



FULLTRÚI TIL LØGMANSSKRIVSTOVUNA

Vit søkja við hesum eftir fulltrúa til Uttanríkisdeildina í Løgmansskrivstovuni at seta sum skjótast.

Í Uttanríkisdeildini verða politisku og rættarligu viðurskifti Føroya við umheimin umsitin, heruppií viðurskiftini við Danmark og Grønland, norðurlandamál, altjóða handilspolitisk mál, altjóða tilfeingismál, menningarhjálp, marknamál, trygdarpolitisk mál og protokoll. Í Uttanríkisdeildini verða eisini felags skjalagoymsla og KT viðurskifti hjá Løgmansskrivstovuni umsitin.

**Uppgávur**
At starvast í einum diplomatiskum umhvørvi krevur góðar persónligar og starvsligar eginleikar, har tú í einum spennandi starvi verður við til at mynda føroyskan uttanríkispolitikk. Aftaná nøkur ár á Uttanríkisdeildini verður væntað av tær, at tú ert til reiðar at starvast á eini av okkara sendistovum í nøkur ár, áðrenn tú kemur heim aftur í starv í Løgmansskrivstovuni.

**Førleikakrøv**
Kravt verður, at umsøkjarar hava viðkomandi útbúgving í samfelagsvísindi, so sum stjórnmálafrøði, løgfrøði, búskaparfrøði ella líknadi útbúgving við lærdan háskúla. Ert tú undir útbúgving og verður liðug/ur í summar, kanst tú eisini søkja starvið. At vera stinn/ur í føroyskum og enskum máli bæði í skrift og talu er eisini ein fyritreyt fyri at søkja.

**Setanartreytir**
Umsøkjari verður sett/ur sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Setanarøkið fevnir um Løgmansskrivstovuna og stjórnarráðini. Gjøllari upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Herluf Sigvaldsson, deildarstjóra í Løgmansskrivstovuni, á telefon 351050.

SKRIVARI TIL SENDISTOVU FØROYA Í BRÚSSEL

Vit søkja við hesum eftir skrivara til sendistovu Føroya í Evropasamveldinum (Brússel) at seta sum skjótast. Sendistovan røkir føroysk áhugamál mótvegis Evropasamveldinum.

**Uppgávur**
Viðkomandi verður partur av dagligu arbeiðsgongdini í sendistovuni. Starvið fevnir millum annað um telefonmóttøku, skjalaskráseting, brævasamskifti, praktisk viðurskifti, at røkja heimasíðuna og tílíkt.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarar eiga at hava skrivstovuútbúgving ella aðra samsvarandi útbúgving. Umsøkjarar við viðkomandi arbeiðsroyndum kunnu eisini søkja. Dentur verður lagdur á góðan málkunnleika, bæði í skrift og talu, serliga føroyskt, enskt, umframt franskt. Umsøkjarar eiga at hava góð samstarvsevnir, vera áhitnir, miðvísir, kunna arbeiða sjálvstøðugt og vera til reiðar at royna nýggjar avbjóðingar.

**Starvsstaðið**
Starvsstaðið verður sendistova Føroya í Evropa Samveldinum, Rue d'Arlon 69, B-1040 Brussels. Sendistovan er skipanarliga samrunnin partur av Uttanríkisdeildini í Løgmansskrivstovuni.

**Setanartreytir**
Starvið er fulltíðarstarv og er skipað samsvarandi teim reglum, sum eru galdandi í donsku uttanríkistænastuni fyri starvsfólk sett á staðnum. Bústaðarviðurskifti eru ábyrgd umsøkjarans.

Gjøllari upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Hákun J. Djurhuus, sendimann í Brússel, á telefon 35 10 77 ella (+ 32) 22 33 08 55.

**Umsóknir**
Umsóknir við prógvum, lívrensli (CV) og viðmælum verða at senda:
Løgmansskrivstovan, Tinganes, FO-100 Tórshavn, ella við telduposti til info@tinganes.fo,
og vera Løgmansskrivstovuni í hendi í seinasta lagi mikudagin 5. juli 2006.

Løgmansskrivstovan stýðjar løgmanni í at stjórna landsstýrinum og hevur ábyrgdina av at fyrireika og fremja uppgávurnar, sum løgmaður hevur sambært stýrisskipanini, nevniliga at samskipa og hava eftirlit við landsstýrinum, umframt fyrisiting og uttanríkismál

Vit draga eina línu
Vit seta skynsemi í hásæti
Vit vilja vita
Vit bróta slóð

Løgmansskrivstovan, Postrúm 64, 110 Tórshavn,

LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister's Office

Tel 351010, Faks 351015, info@tinganes.fo, www.tinganes.fo